

Dettifoss við bryggju í Havn. Skipið er 165,6 m langt, 28,6 m breitt og lastar 1.460 teus.

# Teir vóru fyrstir

Teir vóru fyrstir við bingjuflutningi í Føroyum. Alt Norðuratlantshavið er teirra heimamarknaður og nú eru teir eisini fyrstir við einum vøruhotelli, frígoymslu og flutningsmiðstøð (distributioncenter). Vit tosa um flutningsfelagið Eimskip.

Tað eru ikki so mong ár síðan, at byrja var at palletisera vøru, sum vøra verður paletiserað í dag. Plattarnir vóru stórir og alt góðs varð stúva leyst í skip. Í 80'-unum vóru fyrstu bingjurnar fyltar, men tað var ikki fyrr enn Eimskip byrjaði regluliga sigling á Føroyar síðst í 80'unum, at bingjuflutningur av álvara byrjaði og síðan gjørdist vanligur.



Joel undir Leitinum, sølu og marknaðarleiðari

Flutningur á fremstu parket kring heimshøvini er í bingju. Tá teir tosa um stødd á bingjuskipum verður tosað í teus. 1 teus er støddin á einari 20 fót bingju. Mesti flutningurin er í 40 fót bingjum svarandi til 2 teus. Støddin á skipunum Eimskip siglir við uppá Føroyar er 1.460 teus. Til samanbering er Simone J. 350 teus og bingjuskipini hjá t.d. Mærsk Sealand tátta í 7.000 teus.



Sophus Dal-Christiansen er søluráðgevari í innflutningi.

Logistikkur, ella flutningsfrøði, tá tosað verður um vísindina logistik, er aldargamalt. Innan herleiðslu og í bardaga er logistikkur avgerandi fyri, um bardagin verður vunnin. At optimera flutning er til frama fyri búskapin hjá tí einstaka felagnum. Hann, sum er fremst innan logistik, hevur ein kappingarfyrimun. Hetta kemur somuleiðis umhvørvinum tilgóðar, tí optimerað verður m.a. eftir hvussu nógv orka verður brúkt fyri hvørt kg ella cbm, sum flutt verður.



Sigvør Lamhauge Beder er eisini søluráðgevari í innflutningi.

Tá flutt verður við stórum skipum verður vøran savnað frá einum størri øki. Flutningurin til og frá Europu er samskipaður í Rotterdam og Hamburg, hagar vøra kemur og fer bæði landvegis og sjóvegis. Sama konsept er brúkt í Føroyum. Skipið leggur at í høvuðsstaðnum, og til og frá Havnini verður vøran koyrd og heinta úr hvørjum króki í landum, bæði fullar bingjur (fcl) og smærri sendingar (lcl).



Esmar Simonsen Søluráðgevi í útflutningi hevur eisini umboðan og sølu av salti um hendi.

Eisini bjóðar Eimskip flogfrakt. Hetta eru ofta smærri nøgdir, sum hava skund. Munnu ikki flestu fólk hava lagt til merkis flogfraktbilarnar hjá Eimskip.

## Altjóða royndir – lokala vitan

Eimskip er eitt altjóða felag við skrivstovu í europeiskum og norðuramerikanskum býum. M.a. hevur Eimskip skrivstovu í Immingham í Bretlandi, Rotterdam í Hollandi, Hamburg í Týsklandi, Århus og Keypmannahavn í Danmark, Gøteborg í Svøríki og Frederiksstad í Noreg. Afturat hesum eru fleiri aðrar skrivstovur í somu og øðrum londum. Millum annað skrivstovur í fleiri havnum í USA og Canada. Hetta ger, at Eimskip kann veita beinleiðis tænastu fyri bæði inn- og útflutning á hesum, fyri Føroyar, týdningamiklu marknaðum.

Gjøgnum Hamburg og Rotterdam er beinleiðis samband til og frá Fjareystri s.s. Japan og Kina, og Eystureuropu s.s. Russlandi, Baltisku londunum og Polandi. Fyri føroyskar fyritøkur, sum handla ella umhugsa handil við hesar marknaðir, kann Eimskip virka sum ráðgevi. Tað kann vera torført hjá fyritøkum at byrja á nýggjum ókendum marknaðum. Gjøgnum teirra altjóða arbeiði hevur Eimskip eitt stórt netverk. Hetta kann menna føroyska sølu og keyp á hesum marknaðum.

Við tað at Eimskip siglir til høvuðshavnirnar í Europa og USA er transittíðin stutt. Fyri vøru til útflutnings er stutt frá Rotterdam og Hamburg til størru marknaðirnar í Europa. Fyri vøru til Fjareysturs sigla skipini hjá Hapac Lloyd, K-line og Mærsk beinleiðis frá Rotterdam og Hamburg. Her verður tíð spard og tíð er pengar. Fyri innflytarar merkir hetta, at góður møguleiki er fyri beinleiðis innkeypi frá øðrum marknaðum, enn vit eru von við.

## Goymsla á altjóða støði

Fyri føroyska marknaðin merkir hetta, at Eimskip bjóðar viðskiftafólki sínum tænastu frá einum felag við lokalari vitan og altjóða royndum. Hetta kemur føroyska marknaðinum til góðar. M.a. nýggi skrivstovu- og goymslubygningurin ber boð um hetta. Bygningurin er bygdur eftir altjóða standardum. Øll fylling og tøming av bingjum er undir taki og vøran er vard fyri veðri. Á goymsluni stendur vøran á hillum. 1.270 standard plattapláss eru á goymsluni.

Goymslubygningurin er ein framkomin bygningur bygdur útfrá bestu logistikkloysnum. Ein digital skipan ger at vøran verður skrásett við at skannarar skannað strikukotur. Hetta er ein trygg skipan fyri kundan. Fyri teir kundar, sum brúka vøruhotellið og frígoymsluna, bjóðar Eimskip seg fram til at hava fullkomna goymslustýring.

Vøruhotellið er fyri alla vøru. Bæði vøru sum er innflutt og fyri vøru, sum er framleidd í Føroyum. Øll vita vit hvussu nógv tíð og orka fer til goymslu og goymslustýring hjá teimum, sum hava annað virksemi at takast við. So hví ikki »outsourca« hetta til Eimskip, sum eru serkøn á økinum.

Frígoymsla er eftirspurd av kundum, sum vilja spara likviditet við ikki at tollavgreiða vøruna fyrr enn brúk er fyri henni. Her kann viðkomandi felag keypa inn í stórum og selja í smáðum. Er talan um dýra vøru kann eitt felag vera spert við likvidum vegna stóra goymslu.

## Trolaralandingar og umboðan

Fyrstu fortreytir fyri einari mennandi vinnu er eitt gott flutningsnet. Síðan byrjan hevur Eimskip havt umboðan av skipum og landingar. Hetta bæði fyri føroysk og útlendsk skip. Grunda góða tænastu, bingjuflutning, goymsluloysnir fyri frystan fisk og gott flutningsnet flytur Eimskip trolaralastir, sum eru lagdar upp í Føroyum. Hetta er gott fyri Føroyar sum fiskivinnumiðdepil í Norðuratlantshavi og gevur m.a. føroyingum møguleika fyri at keypa tann fisk, sum verður lagdur upp.

## Saltsøla

Ein vinna skal standa á nógvum beinum. Fyri trimum árum síðan byrjaði Hafnarbakki, sum Eimskip eigur, sølu av salti á Bakka í Runavík. Væl hevur gingið við sølu av salti. Viðskiftafólk eru glað fyri at tveir útbjóðarar eru av salti.

## Stór kapping

Tað verður spennandi at fylgja við í kappingini á flutningsøkinum. Kapasiteturin er øktur munandi nú nýggja skipið hjá Smyril Line er komið. Samstundis sær út til, at út- og innflutningurin ikki veksur.





Sparikassin:

# Sølustevnan elvir til menning í fyritøkunum

**Norðuratlantiska Fiskivinnustevnan er vorðin staðið, har føroyskar fyritøkur vísa menningina av vørunum og tænast-unum síðani seinastu stevnu. Hetta ber í sær, at stevnan skundar undir og stimbrar eina professionalisering av nógvum fyritøkum í landinum og uttanlands. Tað heldur Føroya Sparikassi, sum á stevnuni bjóðar fram kappingarføra fígging**

Atdráttarmegin hjá North Atlantic Fish Fair er stór.

Bæði heima og úti hava partar av vinnulívinum í eina tíð fyrireikað seg til at vera við á sølustevnuni í Runavík, og nú komið er undir land við stevnuni, eru fyritøkur í hundraðtali við.

Føroya Sparikassi, sum seinastu árini er vorðin ein náttúrligur partur av føroyska vinnulívinum, er umboðaður á fiskivinnu-stevnuni. Hesin stóri føroyski peningastovnurin er sannførdur um, at North Atlantic Fish Fair hevur ein týdning fyri fyritøkur í Føroyum, ið ikki eigur at verða undirmettur.

"Ein grundleggjandi týdningur er, at hetta er staðið, har føroysku fyritøkurnar kunnu bjóða seg fram. Eitt annað er, at nógvar av fyritøkunum á North Atlantic Fish Fair lyfta seg upp á eitt hægri stig sum úrslit av stevnuluttøkuni. Vit síggja, at fyritøkurnar seta sær nýggj mál fram ímóti stevnuni í Runavík, og á tann hátt skundar Fish Fair undir og stimbrar eina professionalisering av nógvum fyritøkum í landinum eins og uttanlands", sigur Jónleif Jacobsen, økisleiðari Sparikassans í Eysturoy.

## Vil vísa andlit

Vinnulívsdeildirnar hjá Føroya Sparikassa hava fólk á North Atlantic Fish Fair, og hesi hava sett sær fyri at peningastovnurin skal vera sjónligur á stevnuni. Vinnan skal síggja produktini hjá Sparikassanum, og málið er harumframt at fáa samband við verandi og nýggjar kundar.

"Okkara básur er opin, og vit eru til reiðar at hitta tey, sum hava hug at práta við okkum. Vit vilja fegin skapa nýggj sambond", sigur leiðarin á Vinnulívsdeild Sparikassans, Gunnar Streymoy.

Hann vísir á, at Føroya Sparikassi er opin fyri at fíggja nógv ymisk sløg av vinnuligum verkætlanum bæði innan fiski- og handilsvinnuna.

## Gjaldstænastur

Ein annar partur av tí, Sparikassin hevur at bjóða, eru gjaldstænasturnar, ið allar fyritøkur hava brúk fyri.

Sjónarmiðið hjá Sparikassanum er, at gjaldingarnar skulu fara fram skjótt og trygt. Peningastovnurin gevur kundum sínum atgongd til at fremja flytingar til og úr útlandinum, og saman við HeimaGreiðsluni lættir hetta munandi um bæði vanligar flytingar og lønarflytingar.

Hava fyritøkur inntøkur ella útreiðslur í øðrum gjaldoyra, er umráðandi, at tryggja fyritøkurnar móti óhepnum kursbroytingum, og hesa tænastuna veitir Sparikassin eisini.

Leiðarin á Vinnulívsdeildini vísir á, at allir vinnubólkar í útgangsstøðinum hava áhuga hjá Føroya Sparikassa á North Atlantic Fish Fair.

"Okkara fígging er kappingarfør, og vit vísa ongum frá okkum frammanundan", sigur Gunnar Streymoy.


